# Nútímans fyritøka við yvir hundrað árum á baki

**Føroya Tele er gomul fyritøka, sum hóast farin um tey hundrað árini, er ein nútímans og slóðbrótandi fyritøka. Á heimasíðuni hjá Føroya Tele er í hesum døgum kapping, har høvuðsvinningurin er dreymaferð áljóðandi eitt virði á 50.000 krónur**



Føroya Tele hevur fleiri enn hundrað ár á baki.

Fyrsta telefonlinjan í Føroyum varð í 1905 sett upp ímillum Vestmanna og Tórshavn av vestmenninginum Ólavi á Heygum. Í 1906 yvirtók Føroya Løgting nevndu linju og legði alla telefonútbygging undir nýstovnaðan almennan stovn nevndur "Færøernes Amtskommunes Telefonvæsen", men sum seinni fekk navnið "Telefonverk Føroya Løgtings".

Núverandi Føroya Tele varð umskipað frá almennum stovni til alment partafelag við stovnandi aðalfundi 29. apríl 1998, meðan lógtingslógin er samtykt t. 3. apríl 1998 við afturvirkandi kraft til 1. januar 1998 , hetta fyri rokniskapaskylduna. Føroya Landstýri eigur 100% av partapeninginum, og er tað Vinnumálastýrið sum umsitur Føroya Tele fyri Føroya Landstýri.

Ein nýggj føroysk fjarskiftislóg, samtykt í 1997 av Løgtinginum, setti skjøtil á eitt nýtt tíðarskeið á føroyska fjarskiftismarknaðinum. 1. januar 1999 fekk Føroya Tele konsessión frá Vinnumálastýrinum til at reka fjarskifti og fjarskiftistænastur. Tað nýggja í hesum er, at fleiri aðrar fyritøkur eisini hava fingið konsessión, loyvi, og sostatt kunnu kappast við Føroya Tele.

1930: Allar bygdir í Føroyum knýttar saman av telefonneti hjá Telefonverk Føroya Løgtings.

Skjótt vórðu fleiri telefonlinjur settar upp, og í 1930 vóru allar bygdirnar í Føroyum knýttar saman av telefonneti num við undantaki av, at telefonnetið í Suðuroynni bert hevði radiotelegraf- samband við Tórshavn.

Í 1953 fekk Tórshavn sum fyrsta pláss í landinum støð til sjálvval, og í 1978 høvdu allir felagar í landinum sjálvval.

Í dag er telesamskiftið í Føroyum útbygt til eitt støði, ið kann javnmetast við útbyggingina í teimum longst á leið komnu londunum í Evropa.

Samtakið Føroya Tele er móðurfelag. Dótturfeløgini eru FT Net, FT Samskifti og Televarpið.

## Vinn dreymaferð

Føroya Tele er nútímans fyritøka á so mangan hátt. Eisini roynur fyritøkan at vera so slóðbrótandi sum gjørligt, og leggur eisini dent á at menna tær vørur, tey produkt, ið fyritøkan hevur at bjóða.

- Vit royna at gera okkara allar besta, sum heildarveitari innan kunning, samskifti og tøkni, verður sagt á Føroya Tele.

Sum størsti veitari á kunningar- og samskiftisøkinum, er Føroya Tele eisini týdningarmikil í strembanini eftir at veita føroyingum fremstu tøkniligu menningina.

Í royndunum at nærlkast kundunum og at menna merknaðarføringina, hevur Føroya Tele í hesum døgum eina kapping á heimasíðuni hjá fyritøkuni.

Talan er um eina spurnarkanning, har ein við at svara spurningum um marknaðarføringina, er við í dráttinum um eitt gávukort uppá dreymaferð, ið hevur eitt virði á 50.000 krónur. Eisini eru farteldur at vinna.

Um ein ætlar sær at luttaka, skal ein vitja heimasíðuna www.ft.fo innan 22. desember. Drigið verður tann 23. desember.

## Stór fyritøka

Føroya Tele er fyritøka við nógvum árum á baki, og er eisini størst á sínum øki. Umleið 250 fólk arbeiða hjá Føroya Tele.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















